AGANEVNDIN

F. S. F.
25 OKT. 2007
Móttikið

KÆRA 10/2007

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Áheitan frá Starvsnevnd FSF's um at taka mál um rasistisk ókvæmisorð móti leikara undir dysti í Gøtu millum GÍ-B36 í Formuladeildini upp sum kærumál** | |
| Deild: Formuladeildin | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: Í landskappingini | Kæra innkomin: |
| Kærugjald goldið: Ja □ Nei □ | Kærufreist hildin: Ja □ Nei □ |
| Partshoyring við 5 daga freist: Ja □ Nei □ | Ummæli frá Starvsnevndini: Ja □ Nei □ |
| Partshoyring við 3 daga freist: Ja □ Nei □ | Áheitan um munnliga viðgerð: Ja □ Nei □ |
| Fordømi og úrskurðir: Ja □ Nei □ Kanska □ | |
| Yvirlit yvir skjøl o.a. próvtilfar í kærumálinum:<br>1) Dómarafrágreiðing<br>2) Frágreiðing frá trygdarleiðaranum hjá GÍ<br>3) Munnligar frágreiðingar frá dómara, linjudómara 2, trygdarleiðara hjá GÍ, umrødda áskoðara og leikara nr. 2 hjá B36, sum rópt varð eftir. | |

# AGANEVNDIN

## 1. Kærupástandir og grundgeving fyri kæruni

At eitt GÍ viðhaldsfólk rópti rasistisk ókvæmisorð móti leikara nr. 2 hjá B36, sum er myrkur av húðaliti, undir landskappingardystinum í Gøtu 16. sept.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Kappingarnevndin heitti á Starvsnevnd FSF's um at lata nevnda mál til viðgerðar í Aganevndini.

Sambært grein 2 og grein 5 í Agareglugerð FSF's, sum samtykt á aðalfundi FSF's 3. mars 2007, hevur Aganevndin heimild at viðgera mál um rasistiskan málburð og atburð.

Ein av nevndarlimunum í Aganevndini, Kjartan Mohr, bar seg undan at luttaka í viðgerðini og avgerðini í hesum máli, tí spurningur kann setast við hansara gegnið í mun til viðgerð av málum viðvíkjandi B36. Eftirsum málið er ógvuliga prinsipielt og tað fyrsta av sínum slagi, ið er lagt fyri Aganevndina til viðgerðar, varð varalimur innkallaður fyri at nevndin skuldi vera fullmannað undir viðgerðini og avgerðini av hesum kærumálinum. Varalimurin er Sigmund Poulsen.

Sambært grein 13 í Agareglugerðini kann Aganevndin biðja um munnliga viðgerð av málinum og varð henda heimild brúkt í hesum máli. Allir partar í málinum vórðu innkallaðir til munnliga viðgerð í hølum FSF's 22. okt. 2007. Viðgerðin varð skipað á tann hátt, at allir partar vóru inni samstundis og svaraðu spurningum frá Aganevndini fyri at lýsa fakta í málinum.

## 3. Fakta í málinum

Aganevndin staðfestir, at sambært dómarafrágreiðingini, so hoyrdi linjudómari 2 at eitt ávíst GÍ viðhaldsfólk rópti rasistisk ókvæmisorð móti leikara nr. 2 hjá B36, tá leikarin er á veg inn aftur á vøllin eftir at hava staðið uttanfyri síðulinjuna og sunnað seg eftir at hava fingið ein snudd í eini frísparksstøðu stutt frammanundan.

Trygdarumboðið hjá GÍ sigur í síni skrivligu frágreiðing til nevndina, at GÍ viðhaldsfólkið

viðgongur at hava rópt rasistisk ókvæmisorð móti leikara nr. 2 hjá B36 og at viðkomandi harmast um hendingina.

Í munnligu frágreiðingunum til Aganevndina kann tað staðfestast, at linjudómari 2 stóð umleið hálvanannan metur frá rópandi áskoðaranum, at rasistisk ókvæmisorð vórðu rópt og at tey vóru vend móti leikara nr. 2 hjá B36, sum er myrkur í húðaliti. Somuleiðis hevur rópandi áskoðarin undir munnligu viðgerðini viðgingið at hava rópt rasistisk ókvæmisorð.

**4. Møgulig brot á lógir og reglugerðir hjá FSF sambært kærupástandum**

Í regluverki FSF's eru ongar reglur, sum beinleiðis umrøða viðurskifti, har ein áskoðari sýnir rasistiskan atburð ella málburð í sambandi við dyst. Hinvegin er í Kappingarreglum FSF's í grein 36, stk. 5 áseting um ósømiligan atburð frá venjarum og leikarum og í STEVNU FSF's fyri 2007 er hetta ásett um rasismu: "Leikari, sum eftir dómarans meting sýnir rasistiskan atburð skal revsast við at verða vístur av vølli (Reytt kort). Venjari ella leiðari, sum, eftir dómarans metan, sýnir rasistiskan atburð skal burturvísast av ítróttarøkinum. Dómarin skal tá, skrivliga, boða kappingarnevndini frá tilburðinum. Víst verður her til grein 36, stk. 5 í kappingarreglunum fyri fótbólt."

Grein 1, 2. punktum í kappingarreglunum ásetur, at "I tann mun hesar kappingarreglur onga áseting hava, eru tær til hvørja tíð galdandi alheimsreglur fyri fótbólt sum FIFA ásetur galdandi." Í hesum máli um rasistisk ókvæmisorð frá áskoðara til leikara er tí neyðugt at leita upp reglur í regluverkinum hjá FIFA.

Artikkul 58 í FIFA Disciplinary Code hevur drúgvar ásetingar um rasismu. Sambært Artikkul 3, bókstav h í FIFA Disciplinary Code eru reglurnar eisini galdandi fyri áskoðarar. Høvuðsreglan í Artikkul 58, stk. 1 er soljóðandi:

"Anyone who publicly disparages, discriminates against or denigrates someone in a defamatory manner on account of race, colour, language, religion or ethnic origin, or perpetrates any other racist and/or contemptuous deed, will be subject to match suspension for at least five matches at every level. Furthermore, a stadium ban and a fine of at least CHF 20,000 will be imposed on the perpetrator. If the perpetrator is an official, the fine will be at least CHF 30,000."

Sambært Artikkul 58, stk. 5 kann revsingin fyri brot á reglurnar um rasismu minkast ella detta burtur, um felagið kann prógva "that it was not or was only minimally at fault for the offences in question or if other major reasons justify it, particularly if the offences were provoked intentionally to cause a player, team, club or association to be sanctioned in accordance with this article."

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin staðfestir undir munnligu viðgerðini av málinum, at umrøddi áskoðari stóð framvið vallagirðingini, lið um lið við trý onnur viðhaldsfólk hjá GÍ. Eftir eina frísparksstøðu fór leikarin hjá B36 út um síðulinjuna at sunna seg, og var hann tá staddur umleið hálvan annan metur frá tí staðnum, har umrøddi áskoðarin stóð. Nógv ókvæmisorð vóru søgd, men rasistisku orðini komu, tá leikarin var á veg inn aftur á vøllin.

Aganevndin staðfestir, at trygdarleiðarin hjá GÍ í sini frágreiðing til nevndina er vísir í, at umrøddi

leikari hjá B36 provokeraði umrødda áskoðara, áðrenn áskoðarin rópti rasistisku ókvæmisorðini. Undir munnligu viðgerðin segði trygdarleiðarin, at hann ikki kundi vera 100 % vísir í, at provokatiónin hjá leikaranum kom áðrenn rasistiska rópið, men at hann var rættiliga vísur í tí, hóast hann ikki hoyrdi rópið.

Leikarin hjá B36 hevur játtað, at hann gjørdi eina provokatión við hondini móti umrødda áskoðara, men at hetta varð gjørt aftaná, at hann hoyrdi rasistisku ókvæmisorðini vend móti sær frá umrødda áskoðara, og at hann hevði hondina frammanfyri og ikki aftanfyri bakið, sum trygdarleiðarin hjá GÍ og umrøddi áskoðari siga í sínum frágreiðingum.

Aganevndin staðfestir, at trygdarleiðarin hjá GÍ ikki hoyrdi rasistiska rópið hjá áskoðaranum og at ósamsvar er ímillum tað, ið trygdarleiðarin og umrøddi áskoðari síggja leikaran hjá B36 gera og so tað, ið B36-leikarin viðgongur at hava gjørt. B36-leikarin sigur seg hava havt hondin frammanfyri, meðan trygdarleiðarin og áskoðarin siga, at hondin var aftanfyri baki ella hálvt aftanfyri bakið. Eisini sigur áskoðarin, at tað gingu umleið 2 sekund frá tí at provokatiónin frá leikaranum kom og til hann fataði hana.

Ongin í dómarabólkinum sá provokatiónina frá B36-leikaranum, sum varð vend móti umrødda áskoðara.

**6. Linnandi ella herðandi umstøður, ið hava týdning fyri metingina av málinum**

Aganevndin metir ikki at tað kann prógvast, at B36-leikarin við hondini hevur provokerað umrødda áskoðara, áðrenn rasistisku ókvæmisorðini vóru rópt. Tí kann talan ikki blíva um linnandi umstøður, tá revsingin fyri rasistiska brotið skal ásetast.

**7. Revsimøguleikar sambært lógum og reglugerðum FSF's**

Sambært grein 8 í Agareglugerðini kann Aganevndin sekta feløg og persónar fyri brot á regluverk FSF's. Sum nevnt omanfyri, so eru reglurnar hjá FIFA eins galdandi og reglurnar hjá FSF.

**8. Týdningur av møguligum fordømum og úrskurðum í líknandi málum**

Aganevndin hevur umvegis skrivstovu FSF's spurt seg fyri í grannalondunum um, hvørja revsing tey geva fyri brot á ásetingar um rasismu. Ymiskt er, hvussu grannalondini vildu revsa slík brot. Sum dømi kann nevnast, at í Danmark vildi ein ávaring ella ein lítil bót helst verið givin um talan varð um eitt fyrsta brot, meðan slík brot í Noregi og Svøríki verða revsað við bót millum 5-10.000,- kr. alt eftir í hvørji deild, brotið er framt.

**9. Niðurstøða**

Aganevndin staðfestir, at rasistisk ókvæmisorð frá áskoðarum á leikvølli á ongan hátt kunnu góðtakast. Rasistisk ókvæmisorð móti leikarum ella øðrum er álvarsligt brot á fótbóltsreglurnar, STEVNU FSF's og grundleggjandi reglur um "fair play", óansæð um talan er um provokatión frá leikarum ella øðrum. Aganevndin metir, at í Formuladeildini, sum í størri mun enn aðrar deildir ger brúk av útlendskum fótbóltsspælarum úr nógvum ymiskum londum, er tað serliga umráðandi at verða vakin mótvegis rasistiskum atburði ella málburði. Aganevndin metir, at øll feløg sjónliga eiga at vísa, at tey ikki góðtaka rasistiskan atburð ella málburð á leikvølli, hvørki frá venjarum, leikarum, áskoðarum ella øðrum.

AGANEVNDIN

| 10. Úrskurður |
|---|
| Aganevndin ger av, at Gøtu Ítróttarfelag skal gjalda kr. 10.000,- í bót til FSF fyri brot á regluverki um rasismu undir dystinum leiktur í Gøtu 16. september, ið varð framt av einum GÍ viðhaldsfólki móti leikara nr. 2 hjá B36.<br><br>Aganevndin gevur eisini GÍ og umrødda áskoðara ávaring um, at endurtekur brotið seg, so verður revsingin fyri felagið eins og áskoðarar herd munandi, sum heimilað sambært regluverkinum hjá FIFA. |
| **11. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.** |
| Sambært grein 12 í Agareglugerðini kann avgerðin ikki kærast. |
| **12. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:** |
| **Tórshavn 25 / 10 - 2007**<br>Anni á Hædd<br>Anni á Hædd, formaður |